Dagfesting: 9. januar 2020
Tygara ref.:
Máltal: 17/00828-38

**Løgtingsmál xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frískúlar** (Forskúli, serligur tørvur, skrivstovuhald og málsligar rættingar)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frískúlar**
(Forskúli, serligur tørvur, skrivstovuhald og málsligar rættingar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um frískúlar verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, stk. 2 verður "oyndir" broytt til. "royndir."

**2.** Í § 9, stk. 3 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Frískúli hevur skyldu til at geva heimstaðarkommununi boð sambært 1. pkt."

**3.** § 11, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin veitir næmingunum í frískúlunum tímar til serligan tørv eftir somu reglum sum næmingum fólkaskúlans."

**4.** Í § 12, stk. 3 verður "stýrisins" broytt til: "skúlastýrisins", í stk. 5 verður "stýrisfundunum" broytt til: "skúlastýrisfundunum" og í stk. 6 verður "stýrislimunum" broytt til: "skúlastýrislimunum."

**5.** Í § 13, stk. 1 verður "stýrið" broytt til: "skúlastýrið, í stk. 2 verður "stýri" broytt til: "skúlastýri."."

**6.** Í § 14, stk. 1 og 2 verður "stýrið" broytt til: "skúlastýrið", í stk. 2, nr. 1 verður "stýrinum" broytt til: "skúlastýrinum", í stk. 2, nr. 2 verður stýrið broytt til: "skúlastýrið" og í stk. 2, nr. 2 verður "stýrið" broytt til: "skúlatýrið og "stýri" verður broytt til: skúlastýri."

**7.** Í § 16, stk. 1 og í stk. 1, nr. 4 verður "stýrinum" broytt til: "skúlastýrinum." Í stk. 1, nr. 5 verður "stýrisins" broytt til "skúlastýrisins."

**8.** § 18, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Frískáli skal fyri komandi skúlaár lata landsstýrimanninum fyribils næmingatal í seinasta lagi 1. februar, endaligt næmingatal 1. september og skal fyri 1. juni lata landsstýrismanninum fíggjarætlan fyri komandi fíggjarár."

**9.** Í § 18 verður aftan á stk. 5 sum nýtt stk. sett:
"*Stk.6.* Kommununnar stuðul til forskúlaflokkar, sum verða góðkendir sbrt. § 2, stk. 2, er 85% av rakstrarútreiðslunum, íroknað útreiðslur til skrivstovuhald og 85%

av útreiðslunum til lærara- og námsfrøðingalønir.
Stk. 6. – 9 verða hereftir stk. 7-10.

**10.** Í § 18, stk. 8 verður “ stýrinum” broytt til: “skúlastýrinum.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2020.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Uppskotið um broytingar í fráskúlalógini verður gjørt, tí at tað eru viðurskifti í lógini, sum ivamál verða reist um. Ymiskt er, hvussu kommunur skilja ásetingina um forskúlaflokkar. Mentamálaráðið, nú Uttanríkis-og mentamálaráðið (UMMR) heldur, at forskúlaflokkar í frískúlum eiga at viðgerast eins og forskúlar í fólkaskúlanum, har kommunan rindar allar rakstarútreiðslur, eisini starvsfólkalønir. Hetta er ikki nóg greitt í fríksúlalógini, og tí eru tað summar kommunur, sum halda, at UMMS eigur at rinda stuðulin til starvsfólkalønir, meðan aðrar kommunur t.d Tórshavnar kommuna rindar stuðul til rakstrarútreiðslur, íroknanð stuðul til starvsfólkalønir. Eisini verður ivi reistur um skúlastýrið, har tað í lógartekstinum verður skift millum stýri og skúlastýri, og tí eru tað í fleiri førum stigtakarar, sum halda, at talan er um tvær ymiskar fyriskipanir, eitt stýri og eitt skúlastýri. Harumframt er skipanin broytt viðvíkjandi tímum til serligan tørv, har tað ikki er Sernám, sum veitir skúlunum tímar til serligan tørv, men landsstýrismaðurin. Fyristingarliga eru tímarnir til serligan tørv lagdir Undirvísingarstýrinum at umsita.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Ein atfinning at fríksúlalógini hevur verið, at lógin er ov ógreið í mun til stuðulin til starvsfólkalønir hjá lærarum og námsfrøðingum, sum starvast í forskúlaflokkum í frískúlum. Hetta verður nágreinað, so forskúlar í fólka- og frískúlum verða javnsettir við atliti at, at tað er kommunan, sum rindar stuðul til rakstrarútreiðslur, íroknað stuðul til starvsfólkalønir. Harumframt er galdandi lóg ógreið við ásetingum um bæði skúlastýri og stýri, og tískil verður hetta broytt samsvarandi, sbr. pkt. 1.1 omanfyri.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er at gera ávísar dagføringar í lógini frá 1. aug. 2003, eins og endamálið er at gera lógina greiðari við atliti at stuðlinum til rakstarútreiðslur í forskúlaflokkum, so at tað er tilskilað í lógartekstinum, at kommunurnar rinda stuðul til starvsfólkalønir í forskúlaflokkum í frískúlum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Áseting verður gjørd um stuðulsveiting til forskúlaflokkar í frískúlum, orðingar um skúlastýri og stýri verða dagførdar, so greitt verður, at veljast skal eitt skúlastýri og ikki eitt stýri og eitt skúlastýri, og at ásetingin um tímar til serligan tørv verður dagførd sambært galdandi skipan.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjøl

Uppskotið er sent til ummælis hjá:
Undirvísingarstýrinum
Føroya Lærarafelag
Fríksúlanum í Havn
Fríksúlanum í Kelduni
Lítlaskúla
Føroya Pedagogfelag

Kommunufelagnum

Fíggjarmálaráðnum
Almannamálaráðnum
Løgmansskrivstovuni
Heilsumálaráðnum
Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og
Fiskimálaráðnum

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Uppskotið verður ikki mett at hava stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur í mun til, hvussu skipanin verður umsitin í dag, men fyri kommunur, sum ikki hava goldið stuðul til starvsfólkalønir í forskúlaflokkum, verður hesin partur í fíggingini til rakstur øktur samsvarandi.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Umsitingarliga verður staðfest, at kommunurnar rinda rakstarútreiðslur, íroknað starvsfólkalønir. Fyri landið verða ongar broytingar, men fyri kommunur, sum ikki hava goldið stuðul til starvsfólkalønir, verður broytingin, at tær fara at umsita henda partin í fíggjarligu stuðulsveitingini.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið verður ikki mett at fáa avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið verður ikki mett at fáa avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið verður ikki mett at fáa avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
1) Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tann evropiska mannarættindasáttmálan

2) Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

3) Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum.

**2.9. Marknaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar kendar marknaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar tílíkar ásetingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um beinleiðis ella óbeinleiðis skattir.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki beinleiðis ásetingar um gjald.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki aðrar heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Til nr. 1:
Talan er um at rætta stavseting, har r er dottið burtur í orðinum royndir.

Til nr.2:
Sum er, hevur ivi verið um, hvør hevur skyldu at boða kommununi frá, at næmingur er innskrivaður í einum fráskúla, um tað er fríkúlin ella landið. Tískil er tað við uppskotinum gjørt greitt, at tað er einstaki fríkúlin, ið skal boða heimstaðarkommununi frá um tey børn í kommununi, ið eru innskrivað í fríkúlan.

Til nr. 3:
Við broytingini verður tað landsstýrismaðurin og ikki Sernám, ið veitir fríkúlunum tímar til serligan tørv. Samsvarandi broyting er gjørd fyri fólkaskúlanar. Landsstýrismaðurin kann altíð delegera hesa heimild til annan stovn undir aðalráðnum, og hevur landsstýrismaðurin lagt tímarnar til serligan tørv til Undirvísingarstýrið at umsita.

Til nr. 4, 5, 6, 7 og 10:
Talan er um málsligar dagføringar, har tað verður gjørt greiðari, at talan er um eitt skúlastýri, og ikki um bæði eitt skúlastýri og eitt stýri. Skúlastýrið er ovasta leiðsla í fríkúlanum. Lógarteksturin er ógreiður, tí fleiri førum hevur MMR, nú UMMR fingið afturmeldingar um, at hildið verður, at ein fríkúli bæði skal hava eitt skúlastýri og eitt stýri.

Til nr. 8:
Eins og í fólkaskúlanum verður næmingatalið brúkt sum grundarlag undir tímajáttanini. Neyðugt er tí at hava næmingatøl í sambandi við fíggjarligu stuðulsveitingina til næsta skúlaárið. Mælt verður til at fylgja somu skipan sum í fólkaskúlanum, har fyribils næmingatal verður latið landsstýrismanninum 1. febr., og endaliga næmingatalið verður latið landsstýrismanninum 1. sept. sama ár.

Til nr. 9:
Tulkingarivi hevur verið millum Mentamálaráðið, nú Uttanríkis- og mentamálaráðið og Kommunufelagið, um landskassastuðul eisini skal latast til forskúlaflokkar í fríkúlum, tí ásett er í § 2, stk. 2 í lógini, at landsstýrismaðurin kann loyva, at forskúlaflokkar koma undir lógina við teirri lógfylgju, at forskúlaflokkar hava sama rætt til landskassastuðul sum 1. – 9. flokkur.

Tinghúsvegur 7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo

Sjónarmiðið hjá Mentamálaráðnum er, at stuðulin sambært § 18, stk. 2 í lógini verður roknaður eftir somu skipan sum í fólkaskúlanum, har forskúlaflokkar sambært fólkaskúlalógini eru kommunalir, har kommunurnar rinda allar rakstrarútreiðslur íroknað starvsfólkalønir til lærarar og námsfrøðingar. Við lógaruppskotinum verða skipanirnar javnsettar, soleiðis at kommunurnar rinda stuðul til rakstrarútreiðslur í forskúlaflokkum í fríksúlum, íroknað starvsfólkalønir.

**Til § 2**
Lógin kemur í gildi 1. august 2020, tá ið nýtt skúlaár byrjar.

Mentamálaráðið, xx. januar 2020

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen
aðalstjóri